**VIÐMERKINGAR**

# Sjálvandi samstarv, men á sama støði!

**Jenis av Rana**
*Miðflokkurin*



VAL05

Í viðkvæma spurninginum um tjóðarfrælsið verður málið mangan lýst sum um tey, ið ynskja at vit føroyingar skulu skipa øll okkara viðurskifti sjálvi, harvið ynskja at kvetta alt samband við ikki bert Danmark, men umheimin allan. At siga so er tíverri ein politisk roynd at snara veruleikan til egnan fyrimun og samsvarar ikki við tað, ið t.d liggur aftan fyri politikk Miðfloksins á hesum øki. Tvørturímóti meti vit, at vit føroyingar eiga at bjóða okkum fram til altjóða samstarv, einamest tí vit, við tí kristna grundarstøðinum, sum hóast alt enn hevur fastari røtur her hjá okkum, hava nakað at bjóða øðrum tjóðum og fólkum.

Men hetta samstarv eigur sjálvsagt at vera millum tjóðir, ið eru á sama støði..

Eitt samstarv, har annar parturin krevur at ráða á ávísum økjum hjá samstarvsfelaga sínum, hevur ikki uppiborið heitið samstarv. Har manglar ein tann mest grundleggjandi fortreytin fyri væleydnaðum úrsliti- álit. Hevurtú álit á medmenniskjum tínum, krevur tú ikki ræði- heilt ella partvíst yvir teimum, fyri at kunna samstarva við tey.

Miðflokkurin ynskir einar frælsar Føroyar, ið á jøvnum fóti samstarva við allar heimsins tjóðir, og fyrst av øllum seta álit sítt á Gud himins og jarðar,

Hann, sum gav okkum hesar ríku oyggjar at búleikast í. Álit á nakran annan,verði tað fólk, felagsskapir ella tjóðir, er í besta førði svikafult.

Við hesum grundhugsjónum bjóða vit okkum fram at umboða teg á fólkatingi.

# Samstarv við virðing fyri hvørjum øðrum

**Fær Sambandsflokkurin umboð á fólkating, fara vit niður fyri at samstarva. At senda umboð fyri flokkar sum vilja hesum samstarvi til lívs gagnar ongum - tað hava vit fingið óteljandi prógv fyri.**

**Edmund Joensen**



VAL05

Saman standa vit sterkari. Tað hevur verið er ein grundhugsjón hjá Sambandsflokkinum, og henda hugsjón er enn grundarlagið undir okkara politikki.

Tað sum eyðkennir altjóða politikk í dag er júst samstarv av øllum slag og tvørtur um landamørk. Altjóða samstarvið byggir á viðurkenning av, at allir partar fáa meir burtur úr bæði framleiðslu, samhandli, umhvørvi og mentan við at gera gagn av møguleikunum hjá hvørjum øðrum.

Eyðkennið fyri Sambandsflokkin hevur verið, altíð at lagt rygg til veruligan politikk, tá ið á stóð. Tað fara vit eisini at gera framyvir. Á fólkatingi fara vit at vera røddin hjá landsstýri og løgtingi nú nýskipanir skulu henda í ríkisfelagsskapinum, flogvallaútbygging fremjast og so framvegis.

Sambandsflokkurin fer á fólkatingi í eitt erligt og fremjandi samstarv, sum gagnar føroyska samfelagnum og ríkisfelagsskapinum í síni heild.

# Hví skulu Føroyar hava umboð á Fólkatingi?

**Annika Olsen**
*Fólkatingsvalevni*
*Fólkaflokksins*



VAL05

Henda spurning hava mong sett sær í seinastuni, og skal eg her bera nøkur sjónarmið fram, hví eg meti tað vera týdningarmikið, at Føroyar hava umboðan á Fólkatingi.

Nú Føroyar standa á einum vegamóti viðvíkjandi øktum sjálvsræði, hevur tað sera stóran týdning, at føroysku umboðini ikki lata danir taka avgerðir, ið ganga ímóti øktum føroyskum sjálvsræði. Neyðugt er, at føroysku umboðini upplýsa danir um politisku, fíggjarligu, vinnuligu, sosialu og mentanarligu støðu føroyinga og harvið møguleika fyri at ávirka avgerðir hjá donsku stjórnini. Tað eru týðandi politiskar avgerðir, sum verða tiknar í næstum, millum annað ætlanin hjá dønum um at lata størri ábyrgd til ES herundir uttanríkismál og verjumál. Her eiga føroysku umboðini at vera vakin og taka ábyrgd frá Danmark, so hvørt sum danir lata ábyrgd til ES. Sjálvandi snúgva yvirtøkumál seg altíð um pening, og skuldi tað víst seg, at Føroyar fáa eina smidliga yvirtøkuskipan sum sigur, at so hvørt danir lata ábyrgd til ES, so taka føroyingar eisini ábyrgd frá Danmark, so krevjast góðar avtalur við donsku stjórnina um hvussu hesar yvirtøkur kunnu fremjast í verki.

Ein føroysk umboðan er umráðandi fyri einum góðum samstarvi millum danir og føroyingar. Føroysku umboðini eiga tí at leggja dent á eitt gott samstarv heldur enn at elva til stríð og klandur. Skulu Føroyar í framtíðini ogna sær sjálvstýri, er tað týdningarmikið, at vit hava varðveitt eitt gott og siðiligt samstarv við donsku stjórnina og ikki brent allar brýr av við klandri. Tað snýr seg ikki um at taka sjálvstýri og síðan siga takk fyri okkum. Tað stóra arbeiðið í eini sjálvstýristilgongd liggur nevniliga í, at Føroyar við góðum samstarvi ognar sær góð og trygg rættindi øllum føroyingum at frama.

Nú Føroyar hava tvey umboð á Fólkatingi, er tað somuleiðis týdingarmikið, at hesi í besta mun tosa sama ”mál”, tá ið týðandi avgerðir um Føroyar skulu takast. Eru umboðini grundleggjandi ósamd, er ikki vist, at danska stjórnin kann taka støðu teirra í álvara. Tískil kunnu danir gera sína egnu niðurstøðu, sum í síðsta enda kann ganga ímóti føroysku áhugamálunum. Tá ið tað kemur til sjálvstýrismálið, er tað eyðsæð, at eitt sambandsumboð og eitt fólkafloksumboð ella tjóðveldisumboð kunnu vera ymisk á máli, og hetta kann fáa eina óhepna avleiðing fyri føroyska sjálvsavgerðarrættin. Umboðini eru loyal yvir fyri flokki teirra herheima, og ber tað tí illa til hjá einum sambandsumboði at ganga ímóti Sambandsflokkinum í Føroyum. Um Føroyar veruliga vilja hava sjálstýri, hevði besta umboðanin verið tvey umboð, sum veruliga ganga inn fyri sjálvstýri, og her meti eg Fólkaflokkin vera eitt gott umboð. Fólkaflokkurin hevur havt sæti í mong ár á danatingi við góðum úrslitum, og kemur hann inn aftur eftir hetta valið, fer hann millum annað at virka fyri hesum málum:

- Samtykkja yvirtøkulógina
- Størri sjálvsræði í uttanríkismálum
- Innlit og ávirkan í verjumálum
- Fremja yvirtøkurnar av fólkakirkju og loftmyndugleika
- Einum sjálvstøðugum limaskapi í Norðurlandaráðnum
- Betri upplýsing à Fólkatingi um Føroyar
- Taka ábyrgd fra Danmark, so hvørt Danmark letur ábyrgd til ES

Farið á val og setið x við Fólkaflokkin, hann vil virka fyri sjálvstýri umframt einum góðum samstarvi við donsku stjórnina, ið tryggjar føroyingum trygg og góð rættindi.

# Grundlógin ongin forðing fyri limaskapi í Norðurlandaráðnum

**Rigmor Dam**
*valevni Javnaðarfloksins*



VAL05

Á Fólkatingi fari eg sum eitt hitt fyrsta at virka fyri fullum føroyskum limaskapi í Norðurlandaráðnum. Tíðin er farin frá, at danir leiða okkum inn á áskoðarabonkin, og rinda atgongumerkið okkara.

Í 1966 var tað Kragh, sum legði føroysku umsóknina um limaskap í Norðurlandaráðnum fyri ráðið. Tá var grundlógin eingin forðing fyri limaskapi, og tað vóru ikki danir, sum lógu í buktini, men heldur hini skandinavisku londini. Tískil skulu vit ikki góðtaka boðskapin um, at limaskapur í Norðurlandaráðnum skal stríða ímóti grundlógini, og at hetta er orsøkin til, at vit ikki kunnu søkja um upptøku. Hetta er eitt nýtt argument, sum er íkomið kjakið, og var hetta ikki fatanin hjá danska politiska umhvørvinum fyri árum síðani. Men, sum við so mongum málum í seinastuni, er tað formalistiska linjan, sum vinnur, og vánaliga stevið millum føroyskar og danskar politikarar ger, at so at siga einki er komið burturúr seinastu nógvu árini. Her má vend koma í!

Men hví Norðurlandaráðið? Samstundis, sum nøkur av norðurlondunum gerast alt meira búskaparliga og politisk heft at ES, er Norðurlandaráðið ein pallur, har samstarv innan mentan, útbúgving, granskìng og førleikamenning, eru í hásæti.

Sjálvsagt skulu vit hava viðurkenning og fullgildan limaskap, ikki fyri at hjúkla um okkara sjálvsfatan og sjálvsvirði, men tí vit eru ein tjóð í støðugari menning, eisini mentanarliga og málsliga. Og ikki minst í hesum globaliseringstíðum, har alheimurin í alt størri mun setur mentanarligu og málsligu dagskránna, er neyðugt at vit gera okkum greitt antin vit ynskja at staðfesta norðurlendska samleika okkara við at verða ein viðurkendur partur av norðurlensku familjuni.

Vitja heimasíðu mína: www.javnadarflokkurin.fo/rigmor